*Framhald av síðu 22*

eina góða framløgu av ætlanini at nýta spillhitan frá Sundsverkinum til nýggju býlingarnar í Hoyvíkshaganum. Tórshavnar kommuna hevði fyri stuttum uppskot at gera vatnland á Sundi. Hvussu skilagóð henda ætlan var kann ein ivast í, tí vatnland á skuggasíðu við larmandi dieselmotori sum nærmasta granna er ikki júst áhugavert vitjunarstað.

Spell at fjarhitaætlanin ikki bleiv fram fyri 30 árum síðan. Oljuprísurin gongur bert ein veg og tað er uppeftir, so spurningurin er um nýggju brúkarnir í Hoyvíkshaganum ikki heldur áttu at gjørt íløgu í sólorkuskipan til upphiting. Fer tað at loysa seg at gera eina fjarhitaskipan tá oljan verður so kostnaðarmikil at bert bussar, ambulansur og brandbilar fáa olju ?

### Streymorka

Marita Hentze, verkfrøðingur, segði frá um áhugaverdu kanningarnar, ið Jens Marius Poulsen gjørdi til framleiðslu av orku burturúr streymi. Vestmannasund var tá í uppskoti at fáa sett upp turbinur, men hendi tó ikki nakað ítøkiligt.

Síðan hava m.a. normenn og hetlendingar sett upp royndarverkætlanir. Í Hammerfest eru smáar myllur settar upp á botni og í Hetlandi er onnur skipan nevnd "Stingray", ið er vongur, ið koyrir upp og niður við streyminum.

Fyrimunir við streymorku er at ravmagnið er nógv meiri javnt enn t.d. vind- og alduorka.

Fundurin var síðiligur og áhugaverdur og hugleiddi Óla Breckmann m.a. um hvussu nógvar milliónir tons av torvi menn høvdu skorið og borið til høldar gjøgnum nøkur árhundraðir.

Spurningur var frammi til Klæmint Weihe um SEV ikki kom at verða við sviðið soð nú tøkniliga menningin gekk so skjótt at tørvur ikki bleiv á milliarda íløgunum í vatnorku. Nevnt var sum dømi nýggja plastsólkyknan, ið granskarar á Risø hava uppfunni. Kostnaðurin sigst blíva um 100 kr. fyri fermeturin, so sethús kunnu við bert 10.000 kr. í íløgu framleiða um 10 kW pr. tíma.

Sjálvandi trúi Klæmint ikki uppá slíkt møsn. Olja og vatnorka er og verður álitið, sambært Klæminti.

### Politikur og orka

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, endaði fundin við stuttari famløgu um ætlanir landsstýrisins á orkuøkinum. Arbeitt verður við nýggjari el-veitingarlóg og kemur tað framyvir at verða politiska skipanin, ið stingur út í kortið hvørjar orkuætlanir fremjast skulu. Hetta er í tøkum tíma. Vinnuhúsið og arbeiðarafeløg hava víst á, at orkupísurin er ov høgur. Tað ber snøgt sagt ikki til at kappast við grannalond okkara Ísland og Noreg. Turkaðan fisk ella klippfisk, ið grannanir útflyta fyri fleiri milliarda upphæddir hvørt ár, kunnu vit ikki verða við uppií. Orsøkin er einans SEV og Klæmint Weihe fyri at takka.

Bjarni nevndi vetnistilgongdina, ið við risa stigum tekur seg fram í ídnaðarlondunum. Íslendingar eru uppií útlendskum samstarvi um bygging av fiskiskipi, ið skal nýta vetni sum brennievni, og øll norðanlond fyrireika nýggju orkutøknina. Frá Oslo til Stavanger verða vetnisáfyllingarstøðir settar upp, og danir fyrireika sama leist frá Hanstholm til Hamborg har týskarar eru byrjaðir at seta upp støðir fram við 2000 km av motorvegi.

Ravmagnsskipanin í ES er liberaliserað og stóru framleiðararnir leggja eina æru í at verða so opnir og framskygdir sum gjørligt. Danska el-felagið Elsam hevur opinbara nýggja fyribrygdið nevnt VEnzin. (VE= Vedvarende Energi). Ravmagn, hiti og orka til flutning verða framyvir skilt sum ein eind og ikki tríggir sjálvstøðugur partar. Lykilin er varandi orka, fyrst og fremst vindorka, ið partvís veitir ravmagn á elnetið (í dagtímum) og partvís veitir orku til framleiðslu av vetni (um náttina). Við avbrenning av vetninum fæst ravmagn frá vindorkuni aftur fyriuttan vatnið, ið í tilgongdini er vorið heitt. Á meginlandinum eru fleiri alternativir orkuberar, m.a. ethanol, methanol og plantuolja. Einki av hesum kunnu vit framleiða í Føroyum, tí lívrunnið tilfar ikki er til staðar í nóg stórum nøgdum. Einasta orkubera ella brennievni vit sjálvi kunnu framleiða er vetni, og tí er ongantíð ov skjótt at skjøtil verður settur á frá politiskari síðu.

Og tað verður tað sambart landsstýrinum og Bjarna Djurholm, so vón er fyri framman við nýggju el-veitingarlógini og einskiljingini av SEV.

Havnar Framburðsfelag hevur rós uppiborið fyri skipan av evnis- og tjakfundum. Framtakshugur við fríðari og liberalari vinnu á øllum økjum er tað, ið skal til, skal framtíðar samfelagnum verða lív laga. Men, gloymi ikki atlitið til náttúru og umhvørvið – uttan reina og óspilta náttúru gerst alt tað sama.

# KROSSORÐ

| 442 | TOFTIR | SPANIA | EINS | HOLLAND | FLOG-FELAG | STIG | HAV-VØKSTUR | TONS | KVINNA | EDD | FLØT | FYLGI-SVEINUR | PEILA | GALLIUM | URAN | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| RAVNA-SLAG .......... | 1 | | | | | | | | | | | | | | | |
| REX | | OYÐA / HETJUR | | 2 | | | | TRALEE / LUTI | | DOVNA | | | | | UKRAINE / BÝR | |
| TÝSKT FIRMA | | | | ELV ! | ARGA | | | | | GRUNA / TANGI | 3 | | | ÍTRÓTTAR-STEVNA / SVARA | | |
| NIKKEL | | | BETA / AURORA | | ROMAR-TAL 7 / VENDA | | | | NITRO-GEN / ITALIA | | TÝSK-LAND / STÓRI | | FUGLUR / BÝR | | | |
| FJALL | | | | | | | EFTIR-NAVN | | | | | | | | SEINNA A | |
| TRÆ | | | | | | REAUMUR | GRAMM / FISKA LÍTIÐ | | TÝSKT LAND / ÓTRYGGI | | | | | | TONS / ADVOKAT-AR | |
| ROSSINI | | | | | | | | | | BÍBIL-PARTUR / HJÁLJÓÐ | | | TVÍLJÓÐ | JUNKERS / BYGD | | |
| FRÁ | | | SKREIÐ | RØNNE / HEVUR HUG | | ALFA / EINS | | ILLVILJI / EINS | | | | GLER / HOLLAND | | | | |
| DJURHUUS | | | | | | | 4 | | | | | | INFRA-REYTT / OXYGEN | | | BÝ-LINGUR |
| | SKRÍÐI / LØKUR | | | | AUSTRIA | RIT / TVÆTL | | | | STEINUR | GOTT SKIL / "NEI" | | | | | |
| TITTUL | | | DÝR / MAÐUR | | | | | SKOTSKT NAVN / CIRKA | | 5 | | LITUR | HJÁLJÓÐ / FAR ! | | | |
| ABER-DEEN | | SPANIA / KRÝPUR | | KVINNA | DONSK OYGGJ / KVINNA | | KOL / UNDIR-SKOT | | HEYGGUR / VITJANDI | | | | | | | |
| UTTAN-GARÐS | | | | | | | | | | | IKKI ÚT | MAÐUR / NORGE | | | | |
| ARBEIÐI | | | | | 6 | | | BITIN / STÓLPI | | | | | FUGLUR / TUPOLEV | | | |
| FINSKT NAVN | | | | | | STONGSL / ALFA | | | | KÓS / ITALIA | | FLOGFAR / FIMM HUNDRAÐ | | | SPANIA | |
| FJALL | | | | | | | | | | | | 7 | | | SVØRÍKI | |

## Vinnari:

*Andrias Rein*
*Landavegur 15*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: TINGANES

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| T | Ó | R | S | H | A | V | N | A | R | B | Ý | U | R | | U |
| I | L | A | | Ø | | I | O | | E | E | | F | A | U | N |
| T | A | N | N | D | E | I | L | I | G | A | H | A | V | N | |
| A | V | D | R | A | G | | A | N | G | | R | | E | D | V |
| 441 | | A | | L | E | I | R | | A | U | | A | L | R | A |
| R | Ø | Ð | I | | R | O | | A | E | R | O | P | L | A | N |
| A | K | I | | E | S | S | A | | L | | | M | I | S | T |
| K | | | | T | U | P | O | L | E | V | | Ø | | T | A |
| U | G | | N | A | N | I | | D | I | A | B | L | O | | Ð |
| L | E | O | N | | D | N | A | | K | R | | L | O | V | I |
| | S | | | Í | | | G | R | U | B | B | E | | I | |
| | T | E | I | S | T | I | N | | R | E | | R | Ó | T | A |
| E | I | R | | A | N | V | A | R | | R | F | | L | A | G |
| D | R | U | K | K | | | R | A | N | G | A | G | I | L | |
| D | | | U | | M | I | | P | I | | K | G | | I | L |
| A | L | K | O | H | O | L | I | S | M | A | | G | Æ | S | A |

### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**442**

**Loysunarorðið:** ............................................

Navn: ..............................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: ......................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** - *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar - bæði innan og uttan skúlagátt***